Fra: Jóhanna Arge
Sendt: týsdagur, 2. mars 2021 09:02
Til: 'uvmr@uvmr.fo' <uvmr@uvmr.fo>; Herálvur Joensen <HeralvurJ@uvmr.fo>
Cc: Gunnleyg Árnafjall <GunnleygA@uvmr.fo>; Johnhard Klettheyggj <johnhardk@logting.fo>
Emne: Løgfrøðilig eftirkanning av uppskot til løgtingslóg um at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið

Til Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Løgtingsins umsiting hevur móttikið uppskot til løgtingslóg um at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið.

Í sambandi við løgfrøðiligu eftirkanningina av uppskotinum eru hesar viðmerkingar:

Tað sæst í uppskotinum, at

- verkætlanin er í útboði, sum endar síðst í mars,
- at endaligi kostnaðurin ikki er staðfestur,
- at Landsverk *eftir bestu sannføring* hevur mett kostnaðin til áleið 26,3 mió. kr., og
- at Fíggjarmálaráðið í hoyringarskrivi hevur frámælt, at uppskotið verður lagt fyri Løgtingið.

Í viðmerkingunum til uppskotið stendur, at tað *sum meginregla er skilagott*, at ein verkætlan í minsta lagi er prosjekterað lagi fram til verkætlanaruppskot, áðrenn uppskot til verklagslóg verður løgd fyri Løgtingið. Løgtingsins fíggjarnevnd hevur í fleiri málum viðgjørt hendan spurningin og gjørt greitt, hvussu ásetingin í § 22, stk. 3 í játtanarlógini skal skiljast, sí m.a. løgtingsmál 22/2012, 29/2012 og 84/2013.

Løgtingsins umsiting setir tískil spurnartekn við, um uppskotið er búgvið til viðgerð í Løgtinginum. Vísast skal samstundis á møguleikan at leggja fram fullfíggjað lógaruppskot seinni í hesi tingsetuni við 17 undirskriftum, sbr. § 54, stk. 2 í Tingskipanini.

Verður uppskotið lagt fram, eiga tekstirnir í 2. reglubroti í pkt. 1.4. og í 1.5. undir øllum umstøðum at verða tillagaðir, soleiðis at tað ikki í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður fyrisett, hvussu løgtingsviðgerðin skal fara fram.

Vinaliga

Jóhanna Arge
Løgfrøðingur / Nevndarskrivari

LØGTINGIÐ

tel. +298 363907
johannaa@logting.fo • logting@logting.fo • www.logting.fo